# Hallið hjá Kalli skal burtur

**Hóast eitt hall hjá Kall upp á 6,7 milliónir krónur í fjør, er stjórin í felagnum væl nøgdur við gongdina, og í ár ætlar felagið sær at sleppa undan halli. Kall hevur fimta hvønn telefonkunda í landinum, og felagið ætlar sær at økja støðugt um søluna av øllum sínum tænastum**

FJARSKIFTI
*Eyðun Klakstein*

Kall tekur seg støðugt fram á føroyska fjarskiftismarknaðinum, og hóast úrslitið í fjør var eitt hall upp á næstan sjey milliónir krónur, náddi felagið øllum teimum málum, sum tað hevði sett sær.

– Kall setti sær sum mál fyri 2003 at vaksa um marknaðarpartin innan fastnettelefoni og at økja munandi um GSM-søluna. Eisini setti felagið sær fyri at vaksa um søluna til virki og at hava beinleiðis yvirskot á fastnetinum. Nú roknskapurin fyri 2003 er tøkur, kann felagið staðfesta, at øll hesi mál vórðu rokkin, sigur Bjarni A. Bjarnason, stjóri í Kalli.

Og nýggja málið fyri 2004 er, at javnvág ella avlop skal verða á roknskapinum. Tað skal gerast við meira sølu av øllum tænastum, men felagið hugsar ikki minst um at vaksa um GSM-partin, og so kemur eitt nýtt tilboð um breiðband til internet seinni í ár.

– Gongdin higartil í ár vísir, at vit økja framvegis um okkara sølu, og tí er tað realistiskt at hugsa sær, at vit klára at fáa javnvág ella avlop í roknskapin í ár, sigur Bjarni A. Bjarnason.




*– Gongdin higartil í ár vísir, at vit økja framvegis um okkara sølu, og tí er tað realistiskt at hugsa sær, at vit klára at fáa javnvág ella avlop í roknskapin í ár, sigur Bjarni A. Bjarnason, stjóri í Kalli*

### Kall eigur fimta hvønn kunda

Kall hevur 21 prosent av øllum fastnetfeløgum í Føroyum, 21 prosent av GSM-haldarunum og eisini 21 prosent av haldarunum av uppringdum internetsambandi.

Hóast fastnetfelagarnir í Føroyum fækka, veksur marknaðarparturin hjá Kalli, og talið á fartelefonhaldarum hjá Kalli økist alsamt.

Á fastnetinum vóru 24.300 felagar í Føroyum við árslok 2003. Av hesum vóru 5.100 felagar hjá Kalli.

Útbreiðslan av GSM-fartelefonum í Føroyum økist alsamt. Í 2003 vóru 36.800 GSM-haldarar í landinum. Tað svaraði til 76 prosent av íbúgvunum. Av teimum vóru 7.500 kundar hjá Kalli. Kall hevur boðið út GSM-tænastur í einans eitt gott ár, og felagið hevur gjørt íløgu í egið GSM-kervi.

Sambært stjóranum í Kalli fara fólk frameftir at brúka meira fartelfon og minni fastnettelefon.

– Hóast tað hevur kostað meira at tosa í fartelefon enn vanliga telefon, so brúka fólk nógv fartelefonina, og soleiðis verður eisini framyvir. Fartelefonin gevur kundanum størri møguleikar og frælsi, og tí fer einki at hótta fartelefonina næstu árini, sigur Bjarni A. Bjarnason.

### Færri internetkundar

Marknaðarparturin hjá Kalli innan uppringt internetsamband er eisini 21 prosent.

Her er talið á kundum minkað seinasta árið, men teir kundarnir, sum nýta internet frá Kalli, nýta internetið meira, so sølan er kortini økt.

– Orsøkin til, at færri kundar hava uppringt internet, kann vera, at økta útboðið av sjónvarpsrásum kappast við internetið, sigur Bjarni A. Bjarnason.

Men ein onnur orsøk kann vera, at nýggju tilboðini við breiðbandi eru meira lokkandi fyri kundan, og her hevur Kall ikki havt nakað at bjóða enn. Men tað verður broytt í næstum. Íløgurnar eru gjørdar, royndarkundar eru á skipanini, og í heyst kemur Kall við sínum egna breiðbandtilboðið til føroyingar.

– Uppringt internetsamband blívur ikki við at vera stuttligt, og tí kemur breiðbandið at taka yvir. Vit standa mitt í einum tøkniskifti, har breiðbandið fer at avloysa uppringda sambandi og lutvíst eisini fastnettelefonina, og við breiðbandinum koma nógvir nýggir møguleikar, sigur Bjarni A. Bjarnason.

Føroyski fjarskiftismarknaðurin er lítil, og avmarkað er, hvussu nógv nógv feløg kunnu kappast á honum. Kall metir, at pláss er fyri tveimum veitarum á marknaðinum, og við tíðini væntar felagið, at marknaðarparturin hjá felagnum økist, so betri javnvág verður millum báðar veitararnar á marknaðinum.

## Kall tvífaldaði søluna

Tilsamans var sølan hjá Kalli í 2003 35 milliónir krónur. Hetta er tvífalt so nógv sum samlaða sølan í 2002. Úrslitið hjá Kalli áðrenn rentur og avskrivingar var javnvág. Hetta er munandi betri enn í 2002, tá úrslitið áðrenn rentur og avskrivingar var eitt hall upp á 4,4 milliónir krónur. Úrslitið eftir rentur og avskrivingar í 2003 var eitt hall upp á 6,7 milliónir krónur.

– Úrslitið hjá felagnum stendst av, at felagið er í støðugum vøkstri og byggir upp ein nøktandi marknaðarpart, sum skal bera felagnum uppi í framtíðini. Av hallinum í 2003 stavaði meginparturin frá fyrra hálvári. Seinna hálvár hevði Kall besta rakstrarúrslitið, sum felagið hevur havt, síðan tað fór til verka í 2001, og fyrsta ársfjórðing í 2004 er raksturin batnaður munandi, sigur Bjarni A. Bjarnason, stjóri í Kalli.

– Virksemið hjá felagnum hevur síðan byrjan verið merkt av, at stórar íløgur eru gjørdar fyri at fáa ferð á raksturin. Málið fyri 2003 var at flyta felagið frá íverksetan til vanligan rakstur. Tað eydnaðist. Málið fyri 2004 verður at basa hallinum. Úrslitið eftir rentur og avskrivingar skal javnviga ella geva avlop, sigur stjórin í Kalli.

# Vega bjóðar føroyskt

**Danska spælistaðið VEGA, har nógv kend nøvn plaga at leggja leiðina fram við, fer í august mánaði at hýsa einum serligum føroyskum tónleikatiltaki**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Atlantic Music Event er navnið á konsertini, har Eivør Pálsdóttir, Gestir og Makrel fara at spæla fyri donskum áhoyrarum.

Konsertin er komin í lag í samstarvi millum Vega og Norðurlandahúsið í Føroyum. Ætlanin var í fyrstu syftu, at Prix Føroyar vinnararnir, Gestir, skuldu hava konsert einsamallir í Vega, men síðani vaks hugskotið til, at onnur føroysk nøvn eisini skuldu á plakatina.

Fróði Vestergaard, sum er samskipari í Norðurlandahúsnum, vónar, at konsertin fer at vera somikið væleydnað, at tað fer at bera til at gera enn fleiri slík føroysk átøk í Keypmannahavn. Ætlanin er at bjóða fjølmiðlafólki og øðrum relevantum persónum at koma til konsertina, sum verður tann 28. august.



*Makrel spælir fyri donskum oyrum á Vega í august mánaði*



Fíggjarlógin 2005:

# Hallið verður ikki størri

**1. oktober skal fíggjarlógin 2005 leggjast fram. Tjóðarinntøkan er minkað um 200 milliónir seinastu tvey árini, og sambært fíggjarmálaráðharranum Bárði Nielsen verður talan tí aftur um hall í 2005. - Men endamálið er, at hallið skal ikki vera størri enn tær 204 milliónirnar í undirskoti í ár, sigur Bárður Nielsen**

FÍGGJARLÓG
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*



*- Tjóðarinntøkur landskassans vóru hægri í bæði 2002 og 2003 enn tær eru í ár og helst í næsta ár, og við tað at inntøkurnar eru minkaðar, verður fíggjarlógarúrslitið aftur komandi ár undirskot, men endamálið er tó ikki at økja um hallið, sigur Bárður Nielsen, fíggjarmálaráðharri*

Eftir eina bráðfeingisfíggjarlóg í ár eru fyrireikingarnar av álvara farnar í gongd til fíggjarlógina 2005. Landsstýrismenninir hava havt nakrar fundir og kjakast um síni ynski og tørvir, og 1. oktober skal fyrsta uppskot til fíggjarlóg eftir ætlan leggjast fram.

– Arbeiðið gongur væl, og um mánaðarskifti august-september vera vit eftir ætlan lidnir við okkara uppskot um komandi fíggjarlógina, sigur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Bárður Nielsen.

### Inntøkur minka

Spurdur, hvørji fyribils tøl eru komin á borðið, og hvørjar ábendingar eru um endalig úrslit, sigur landsstýrismaðurin, at talan á fíggjarlógini 2005 aftur verður um hall.

– Inntøkurnar vóru hægri bæði í 2002 og 2003, enn tær eru í ár og helst í næsta ár eisini, og við tað at tjóðarinntøkurnar eru minkaðar, verður fíggjarlógarúrslitið aftur komandi ár undirskot, sigur Bárður Nielsen. Hinvegin leggur hann dent á, at endamálið er, at hallið ikki skal gerast størri í 2005 enn tær 204 milliónirnar, sum í ár vórðu í undirskoti, eftir at Fíggjarnevndin hevði tikið góðar 73 milliónir av upprunaliga uppskotinum hjá Fíggjarmálaráðnum.

Í 2002 vóru inntøkur landskassans 3,6 milliardir, í 2003 vóru tær 3,566 milliardir, og í 2004 eru tær 3,41 milliardir. Við hesum sæst ein afturgongd á um 200 milliónir, og hetta minkar sambært Bárði sjálvsagt um útlitini fyri betri fíggjarlógarúrsliti.

– Men endamálið er ikki at økja um hallið, slær Bárður Nielsen fast.

Fíggjarmálaráðharrin greiðir eisini frá, at manningin í Tinganesi hevur havt nakrar fundir um fíggjarlógina 2005, og kjakast hevur verið um, hvar og hvussu nógv kann sparast, so eitt vaksandi undirskot verður fyribyrgt.

### Sami íløgukarmur

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur saman við hinum landsstýrismonnunum eisini havt fund um íløgukarmin í 2005, og hóast heldur einki er avgjørt hesum viðvíkjandi, verður talan um á leið somu íløgukarmar sum á núverandi fíggjarlóg.

– Fleiri stórar verkætlanir eru í gongd, og tær halda eftir ætlan fram uttan nakrar skerjingar. Íløgulistin er langur, men í hesum høpi kann eg t.d. nevna undirsjóvartunnilin til Klaksvíkar, miðnámsskúlan í Vági, útbyggingina á Landssjúkrahúsinum og Øravík-Hov verkætlanina, sigur fíggjarmálaráðharrin at enda.

## FAKTA

Hallið á fíggjarlógini fyri 2004 var 204 milliónir krónur

Upprunaliga uppskotið hjá Fíggjarmálaráðnum fyri fíggjarlógina 2004 var 277 milliónir í halli

Tjóðarinntøkur landskassans eru farnar úr 3,6 til 3,41 milliardir seinastu tvey árini

Málið er ikki at økja um hallið á fíggjarlógini 2005

Íløgukarmurin fyri fíggjarlógina 2005 verður tann sami

# Nýggjur orkupolitikkur

TÍÐINDASKRIV
*Oljufyrisitingin*

Landsstýrismaðurin í vinnumálum Bjarni Djurholm hevur sett ein arbeiðsbólk at orða eitt uppskot til yvirskipaðan orkupolitikk og elveitingarlóg. Í hesum sambandi er gjørt av at seta ein hoyringsbólk við umboðum úr feløgum og felagsskapum, at umboða føroyska orkuøkið, bæði sum veitarar og brúkarar. Endamálið við hoyringsbólkinum er at tryggja, at øll viðkomandi sjónarmið verða tikin við í arbeiðið.

Ætlanin er at skipa eitt regluligt og formligt samskifti millum hoyringsbólkin og arbeiðsbólkin, og vil Oljufyrisitingin hervið bjóða Føroya Náttúru- og Umhvørvisverndarfelagi at velja eitt umboð í hoyringsbólkin.

Vit vilja eisini nýta høvið at bjóða til fyrsta fundin við hoyringsbólkin hósdagin tann 1. juli klokkan 10:00 í hølunum hjá Oljufyrisitingini í Brekkutúni 1. Her verður kunnað um arbeiðssetning, og um hvussu arbeiðið ætlandi verður skipað.

Til fyrsta fundin verður heitt á hesar partar um at taka lut: SEV, P/F Fjarhitafelagið, Føroya Kommunufelag, Føroya Náttúru- og Umhvørvisverndarfelag, Føroya Reiðarafelag, P/F Føroya Shell, IRF, Kommunusamskipan Føroya, Kommunala Brennistøðin, Sp/F Røkt, P/F Statoil og Vinnuhúsið.

Vinarliga boðað frá luttøku til Oljufyrisitingina innan 29.juni, og hvør kemur at umboða tykkum í hoyringsbólkinum.

